# RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2018

| AVRIT |
|---|

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Lýsing av virkseminum** | |
| Upplýsingar um ráðið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2018** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin fyri 2018 hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Ársroknskpurin er settur upp samsvarandi ásetingum, ið føroysk lóggáva setur roknskaparhaldi.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum.

Ársroknskapurin verður lagdur fyri ársfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 18. februar 2019

**Stjórn**

Lovisa Petersen Glerfoss
stjóri

**Starvsnevnd**

Kári Thorsteinsson
nevndarformaður

Jónhild Rasmussen
næstforkvinna

Vivian Johansen
nevndarlimur

Andrea á Rípuni
nevndarlimur

Mikkel H. Frandsen
nevndarlimur

Ársroknskapurin er lagdur fram og góðkendur á ársfundi felagsins, tann

______________________________
fundarstjóri

## Váttan frá óheftum grannskoðara

***Til Ráðið fyri Ferðslutrygd***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur í samsvar við góðan roknskaparsið.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi ráðsinsí roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi góðan roknskaparsið.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Váttan frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Váttan frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 18. februar 2019

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um ráðið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Ráðið fyri Ferðslutrygd<br>J. H. Schrøtersgøta 7<br>FO-100 Tórshavn |
| | Telefon: 220064<br>Heimasíða: www.rff.fo |
| | Kommuna: Tórshavnar<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Starvsnevnd** | Kári Thorsteinsson, nevndarformaður<br>Jónhild Rasmussen, næstforkvinna<br>Vivian Johansen<br>Andrea á Rípuni<br>Mikkel H. Frandsen |
| **Stjórn** | Lovisa Petersen Glerfoss |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Óðinshædd 13, Postrúm 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefax: 35 17 01<br>Teldubústaður: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir samsvarandi ásetingum, ið føroysk lóggáva setur roknskaparhaldi.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar í stigum, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum fylgja av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva ráðnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr ráðnum, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðani eru sannað ella avsannað innan ársfrásøgnin verður løgd fram.

## Rakstrarroknskapur

### Inntøkur

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Stuðul verður tíðargreinaður og innroknaður smb. móttiknum játtanum og avhildnum kostnaði hjá stuðulsveitarum.

### Annar uttanhýsis kostnaður

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, tiltøk, fyrisiting, leigu og tap av áognarum.

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Skuld

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld og aðra skuld, verður tikið við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 2.032.584 | 2.675.297 |
| | **Nettosøla** | **2.032.584** | **2.675.297** |
| 2 | Akfarskostnaður | -6.547 | -6.424 |
| 3 | Høliskostnaður | -80.507 | -75.080 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaður | -415.944 | -288.952 |
| 5 | Starvsfólkakostnaður | -779.283 | -685.161 |
| | **Kostnaðir** | **-1.282.281** | **-1.055.617** |
| | Børn í bili | 0 | -16.733 |
| | Hjálmátak | -161.924 | -133.934 |
| | Børn og ferðsla | -8.681 | -6.000 |
| | Átak móti sløktum baklyktum | 0 | -48.000 |
| | Supernova | -50 | -343.584 |
| 6 | Undirvísing | -170.976 | -170.164 |
| | Rúsdrekka og ferðsla | -134.626 | -205.466 |
| | Hin dagin eg hevði skund "FERÐ" | -43.749 | -374.461 |
| | Kanningar | -15.000 | -75.668 |
| | Undirvísingartilfar | -25.110 | -9.375 |
| | Samstarv við vinnu | 0 | -45.625 |
| | Lýsing | 0 | -35.072 |
| | Gáloysni | -167.227 | -174.738 |
| | Endurskinvestar | -23.092 | -54.987 |
| | Endurskynsátak | -10.373 | -2.400 |
| | Ymisk onnur tiltøk | 0 | -8.250 |
| | **Tiltøk** | **-760.808** | **-1.704.457** |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -806 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **-11.311** | **-84.777** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | Býtt frá fluttum úrsliti | -11.311 | -84.777 |
| | **Býtt tilsamans** | **-11.311** | **-84.777** |

## Fíggjarstøða

| Nota | OGN | 31/12 2018 | 31/12 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 2.900 | 600 |
| | Depositum | 2.644 | 2.644 |
| | Tíðaravmarkingar | 19.663 | 8.778 |
| | Áogn tilsamans | 25.207 | 12.022 |
| 7 | Peningur | 55.900 | 61.473 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **81.107** | **73.495** |
| | **OGN TILSAMANS** | **81.107** | **73.495** |

## SKYLDUR

| Nota | | 31/12 2018 | 31/12 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 8 | Flutt úrslit | 55.325 | 66.636 |
| | **Eginogn tilsamans** | **55.325** | **66.636** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 25.782 | 6.859 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 25.782 | 6.859 |
| | **Skuld tilsamans** | **25.782** | **6.859** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **81.107** | **73.495** |

## Notur

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Stuðul frá Landsstýrinum | 1.200.000 | 1.000.000 |
| | Limagjald frá kommunum og øðrum | 287.490 | 284.260 |
| | P/F Betri Trygging | 261.096 | 1.017.748 |
| | P/F Trygd | 283.998 | 373.289 |
| | | **2.032.584** | **2.675.297** |
| **2.** | **Akfarskostnaður** | | |
| | Trygging og vegskattur | 6.072 | 6.069 |
| | Hýruvognar | 475 | 355 |
| | | **6.547** | **6.424** |
| **3.** | **Høliskostnaður** | | |
| | Húsaleiga | 72.809 | 73.845 |
| | Trygging | 2.270 | 737 |
| | Annar kostnaður | 5.428 | 500 |
| | | **80.507** | **75.082** |
| **4.** | **Fyrisitingarkostnaður** | | |
| | Skrivstovulutir | 114.872 | 58.358 |
| | Umboðan | 7.225 | 10.470 |
| | Telesamskifti | 8.733 | 10.011 |
| | Post- og tænastugjøld | 5.685 | 3.639 |
| | Grannskoðan | 19.880 | 24.315 |
| | Roknskapar- og bókhaldshjálp | 38.250 | 37.500 |
| | Tryggingar | 3.773 | 2.890 |
| | Limagjøld | 1.500 | 1.500 |
| | Ferða- og fundarútreiðslur | 78.313 | 51.603 |
| | Gávur o.a. | 6.650 | 804 |
| | Lýsingar | 27.145 | 21.947 |
| | Bankakostnaður | 4.830 | 1.017 |
| | Skeið o.l. | 17.513 | 53.943 |
| | Avskrivað limagjald | 0 | 8.000 |
| | Aðrir kostnaðir | 81.575 | 2.955 |
| | | **415.944** | **288.952** |

## Notur

| | 2018 | 2017 |
|---|---:|---:|
| **5. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Løn | 734.124 | 666.427 |
| Flutt til tiltøk | -82.556 | -94.524 |
| Eftirløn | 92.156 | 84.645 |
| Samhaldsfasti, Barsilsgjald, ALS | 35.559 | 28.613 |
| | **779.283** | **685.161** |
| **6. Undirvísing** | | |
| Lønarútreiðslur | 82.556 | 88.524 |
| Aðrir kostnaðir viðv. undirvísingartilfari | 88.420 | 81.640 |
| | **170.976** | **170.164** |

| | 31/12 2018 | 31/12 2017 |
|---|---:|---:|
| **7. Peningur** | | |
| P/F Bank Nordik | 55.900 | 61.473 |
| | **55.900** | **61.473** |
| **8. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit 1. januar 2018 | 66.636 | 151.413 |
| Flutt úrslit í árinum | -11.311 | -84.777 |
| | **55.325** | **66.636** |